Samferðsluráðgevi




# Vilt tú knýta Føroyar tættari saman?

Samferðsluøkið er í stórari broyting. Nýggjur Smyril er komin til landið, og Norðoyartunnilin verður skjótt tikin í nýtslu. Føroyar verða alsamt tættari knýttar saman, og tað gevur nýggjar møguleikar og avbjóðingar.

Vilt tú verða við til at mynda hesa gongdina, so er eitt starv sum samferðsluráðgevi á Samferðsludeildini leyst at søkja. Talan er um eitt breitt, krevjandi og spennandi starv, sum tú fært høvi til at mynda og byggja upp.

**Starvið**
Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja og samskipa almennu ferðsluna á sjógvi og landi, sum eru Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Sum samferðsluráðgevi fært tú ábyrgd fyri rutuplanlegging og fyriskipan av ferðaætlan. Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at greina ferðslumynstrið, marknaðin og prísskipanina. Tú kemur at standa fyri hagtalsgreiningum, at optimera og samskipa leiðirnar, og tú verður við til at menna nýggjar tænastur. Útbjóðing av leiðum og sáttmálastýring verður somuleiðis títt starvsøki.

Nú ferðslumynstrið í Føroyum broytist, liggja fleiri størri uppgávur og verkætlanir fyri framman, sum tú verður partur av. Tað snýr seg um

- at gera heildarætlan fyri samferðslukervið
- at fyrireika nógvu broytingarnar í sambandi við Norðoyatunnilin
- at innføra kt-amboð til rutuplanlegging og kunning
- at fyrireika næstu útbjóðing av Bygdaleiðum
- at fyrireika nýggja ferðaseðlaskipan
- at menna skipaða marknaðarføring

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú hevur hægri útbúgving innan verkfrøði ella búskap. Hevur tú royndir í fakinum, og ert tú vanur við at arbeiða við prosjektum, so er tað ein avgjørdur fyrimunur.

Tú hevur evnini at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað. Tú ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni og eitt lætt lyndi. Og so orðar tú teg greitt og væl, bæði munnliga og skrivliga.

**Umsókn og treytir**
Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknarfreistin er 17. november klokkan 12. Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, att. Starvsfólkadeildin, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Andrass Jensen, deildarleiðara, á telefon 34 30 00 ella t-post anj@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo



Íløgustjóri til Sp/f 14

# Eitt gott eyga fyri íløgum

Sært tú nýggjar møguleikar? Tevjar tú, hvat kastar av sær? Og vilt tú royna kreftir á altjóða marknaðum? So er eitt spennandi starv sum íløgustjóri leyst at søkja.

Sp/f 14 seldi skipasmiðjuvirksemið úr felagnum í fjør, og síðan eru ymsar broytingar gjørdar innanhýsis. Nú eru vit til reiðar at fara til verka sum íløgufelag.

Sum íløgustjóri verður tú við til at menna eina gamla fyritøku við nýggjum avbjóðingum. Talan er um eitt spennandi starv við góðum møguleikum fyri fakligari menning. Felagið hevur heimstað í Føroyum, men vit virka í einum magnandi altjóða umhvørvi. Ætlanin er, at vit verða 3 til 5 fólk, sum røkja virði felagsins á skynsamasta hátt.

**Starvið**
Starvið sum íløgustjóri fevnir um at fylgja við íløgum felagsins innan- og uttanlands. Tú skalt hava eitt gløgt eyga fyri nýggjum íløgumøguleikum, og tín uppgáva verður at greina og leggja íløgumøguleikar fyri nevndina. Vit samstarva við fleiri uttanhýsis íløguráðgevar, bæði í Føroyum og uttanlands, og tú samskiftir javnan við teir.

**Førleikar**
Vit rokna við, at tú hevur hægri útbúgving og royndir. Góður kunnleiki til íløguvirksemi er ein treyt, og vit leggja dent á tíni evni at síggja, hvar møguleikarnir liggja. Tú hevur dirvið, torir at taka avgerðir og samskiftir raðið á enskum.

**Treytir og umsókn**
Vit bjóða tær ein virkispall á altjóða stigi og áseta setanartreytirnar í felag. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, ert tú vælkomin at ringja til Gunnar Mohr, stjóra, á 501121 ella við telduposti: gmo@14.fo

Umsóknarfreistin er 8. november 2005.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Sp/f 14
Stílað Gunnari Mohr
J.C. Svabosgøta 29
FO-100 Tórshavn

Sp/f 14 varð stovnað í 1936 og rak skipasmiðjuvirksemi til 2004. Fyritøkan virkar nú burturav sum íløgufelag. Eginognin tann 31.12.2004 var 288 milliónir krónur. Vit virka í einum altjóða umhvørvi og hava samband við íløgufeløg og peningastovnar kring alt Evropa.

**Sp/f 14**

J.C. Svabosgøta 29, FO-100 Tórshavn, www.14.fo